tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 31.03.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, møtti kl. 18.06, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech, møtti kl. 17:27.

Varalimir:

Viðmerking: Arnfinn Bech møtti til mál, 20/25 og eftirfylgjandi.
Bjarni Hammer, møtti til mál 22/25 og eftirfylgjandi.

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 17/25 | 25/00120-1 | Eldraráðið -val av limum í eldraráðið fyri valskeiðið 2025-2028 |
| 18/25 | 25/00045-1 | Fyrispurningur til teknisku deild um at yvirtaka og keypa partar av matr.nr. 555a og Vípuvegi |
| 19/25 | 24/00095-3 | Kongavitjan 2024 |
| 20/25 | 24/00279-4 | Stroyming av býráðsfundum |
| 21/25 | 24/00374-2 | Fundarskipan fyri Tvøroyrar býráð |
| 22/25 | 24/00375-1 | Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu 2025- |
| 23/25 | 25/00144-1 | IRF -aðalfundur 29. apríl 2025 |
| **Til kunningar** | | |
| 6/25 | 21/00015-4 | NÁM -avtala um undirvísignartilfar |
| 7/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| 8/25 | 25/00115-2 | RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2025 |
| 9/25 | 25/00126-2 | Integratiónslógin -integratiónssamskipari |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur býráðsfundin 31.03.2025, kl. 17.07, og kunnar um, at enn eitt mál er komið á skrá, síðan lýst var til býráðsfundin; *Talan er um mál 23/25 “25/00144 IRF -aðalfundur 29. apríl 2025”*

Kristin Michelsen, borgarstjóri spyr um viðmerkingar eru til skránna? -Ongin viðmerking

Til støðutakan

## 17/25
## 25/00120-1 Eldraráðið -val av limum í eldraráðið fyri valskeiðið 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.03.2025 | 11/25 |
| 2 Býráðið | 31.03.2025 | 17/25 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 09.03.2025)**
Samb. viðtøkunum fyri BHS, Bú og Heimastænastuna í Suðuroy skal Tvøroyrar kommuna velja 2 umboð í Eldraráðið.

**Viðtøkur fyri eldraráðið**
**§1 Endamál**
- *Eldraráðið er ráðgevi hjá Bú- og Heimatænastuni (BHS), og er millumlið í samskiftinum millum eldru borgararnar og BHS.*

**§ 4 Eldraráðsins samanseting**
- *Eldraráðið verður samansett eftir sama leisti, sum stýrið fyri BHS:*
  *Vágs og Tvøroyrar kommuna velja 2 limir hvør.*
  *Sumbiar, Porkeris, Hovs, Fámjens og Hvalbiar kommuna velja 1 lim hvør.Stk. 2, Valskeiðið er 4 ár.*

**Viðtøkubroyting**
Stýrið hjá Bú- og Heimatænastuni hevur á fundi 22.04.2021 samtykt at broyta viðtøkurnar hjá Eldraráðnum á tann hátt, at onki val verður til eldraráðið, men at hvør kommuna veldur síni umboð til eldraráðið, ið verður samansett eftir sama leisti, sum stýrið fyri BHS.

Hetta merkir, at Vágs- og Tvøroyrar Kommuna velja 2 umboð hvør, meðan Sumbiar-, Porkeris-, Hovs-, Fámjins-, og Hvalbiar kommuna velja 1 umboð hvør.

**Lógargrundarlag:**
- *Í samsvar við løgtings nr.19 frá 7.apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hava kommunurnar í Suðuroy avgjørt at gera eitt felags eldraráð fyri Suðuroynna og hevur Bú- og Heimatænastan í Suðuroy (BHS), ið er samstarvið hjá eldraøkinum í Suðuroy, ábyrgd av at seta hetta í verk og at hava samskiftið við eldraráðið. Uppgávan hjá eldraráðnum er at ráðgeva BHS í spurningum, ið hava við eldrapolitikk at gera.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Mælt verður til, at Tvøroyrar býráð velur 2 umboð í eldraráðið fyri BHS valskeiði 2025-2028 eftir lutfalsvallháttinum. Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. marts 2025:**
Sosiala nevnd mælir til at Tvøroyrar Býráð velur tvey umboð í eldraráðið, og at uppskot verða løgd fram á býráðsfundinum.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Anita Vibergsdóttir mælir til, at Marianna Jacobsen og Finnleif Guttesen, verða vald sum umboð fyri Tvøroyrar kommunu í eldraráðið. Einmælt samtykt.

**18/25**
**25/00045-1 Fyrispurningur til teknisku deild um at yvirtaka og keypa partar av matr.nr. 555a og Vípuvegi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2025 | 5/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 27/25 |
| 3 Býráðið | 31.03.2025 | 18/25 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) 27-01-2025**
Heidi Djurhuus hevur í telefonsamrøðu við undirritaða sett fram uppskot um, at kommunan yvirtekur partar av matr.nr. 555a, sum liggja úti á kommunalum vegi. Talan er um umleið 293 m2 av vegi. Um hon letur vegin fyri einki, ella um kommunan skal keypa tað frá henni, er óvist.
Í somu telefonsamrøðu sigur hon seg eisini vera sinnaða at selja tann niðasta partin av matr.nr. 555a til kommununa, umleið 292 m2, sum er avsett til veg í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Uml. 29.200 kr

**Tilmælið:**
Mælt verður til at yvirtaka/keypa part av Vípuvegi og at keypa 292 m2.

**Tekniska nevnd 10. marts 2025:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku deild.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at heita á teknisku deild, um at samráðast við eigaran, við atlitið til at kommunan eisini keypir partin av matr.nr 555a (143m2), ið liggur eystan fyri kirkjuna, norðan fyri Sevmýrisveg.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá eigaranum av matr. nr 555a, at kommunan keypir uml. 292m2 av sunnara enda av matr.nr 555a, samsv. viðhefta kortskjal. Og at Kommunan yvirtekur uml. 153m2 av Vípuveg uttan kostnað, og at umsitingin samskiftir við eigaran av matr,. nr. 555a, um at keypa teir uml. 140m2, ið liggja norðanfyri Sevmýrisvegin.

**19/25**
**24/00095-3 Kongavitjan 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Mentanarnevndin | 11.02.2025 | 3/25 |
| 5 Býráðið | 31.03.2025 | 19/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.05.2024**
Tvøroyrar kommuna fær vitjan av Fríðriki kongi og Mary drotning 13. juni 2024, og verður Tvøroyrar Kommuna í hesum sambandi vertur fyri hátíðarveitslu í SALT á Drelnes kl. 19.00.

Skráin fyri vitjanina er, at Kongshjúnini vitjar í barnagarðinum Mýrifípuni, haðani fari verður vestur í plantaguna, har tey planta eitt træ í samband við at plantagan fyllir 100 ár í 2024.

Kongaskipið Dannebrog liggur við bryggju á Drelnes, haðani tað fer frá bryggju við kongsparinum kl. 22.00.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mælt verður til at fíggja vitjanini sum eykajáttan til §114, umboðan**.**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað -Fíggjarnevndin mælir til at vitjanin verður fíggja við eykajáttan §115 íløgur í fyrisiting. Málið verður beint í býráðið eftir at greitt er, nær Kongavitjanin verður.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinum fundi.

**Kommunustjórin 21.juni 2024:**
Sum øllum kunnugt, bleiv Kongavitjanin, ið skuldi verða 11.-12. Juni 2024 fyribils avlýst. Avgerðin at avlýsa bleiv tikin av Løgmanni, orsakað av óvissu um verkfallið hjá FA kundi ávirka Kongavitjanina. Nú er uppskot, ið tó enn ikki er alment fyri vitjanina, fyrr enn grønt ljós er komið frá kongshúsinum at vitjanin verður frá 11.-13. juni 2025. Tað merkir, at vitjað verður í Havn mikudagin 11. juni, í Vági, Fámjin og á Tvøroyri hósdagin tann 12. juni

**Býráðið 27. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 14. Januar 2025:**
Løgmálaráðið og Kongshúsið boða alment frá, at vitjanin hjá Fríðriki kongi og Mary drotning í Føroyum verður frá 11.-13. juni 2025. Tað merkir, at vitjað verður í Havn mikudagin 11. juni, í Vági, Fámjin og á Tvøroyri hósdagin tann 12. Juni.

Kommunustjórin mælir til, at byrja fyrireikingina av vitjanini í viðvíkur Tvøroyrar kommunu.

**Mentanarnevndin 2025-2028 11. februar 2025:**
Málið er umrøtt, kunnað og tikið til eftirtektar.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Borgarstjórin kunnar um kongavitjanina, málið bleiv umrøtt og tikið til eftirtektar.

**20/25**
**24/00279-4 Stroyming av býráðsfundum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.03.2025 | 20/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 13.02.2025**
Heitt verður á býráðið um at viðgerða hvørt býráðsfundir skulu stroymast.

**Viðmerkingar:**
Samb. Kommunufelagnum eru tað 4 kommunur av 25, sum stroyma býráðsfundir; Tórshavn, Klaksvík, Sunda og Fuglafjørður. Tvs. at her er talan um ljóð og mynd.

> ***Á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum verður kunna um at:***
> *Sambært § 26, stk. 1 í kommunustýrislógini eru kommunustýrisfundir í útgangsstøðinum almennir. Hetta almenni til kommunstýrisfundir gevur tó ikki borgarum heimild til at gera ljóð- ella videoupptøkur av fundunum.*
> *Stroyming av býráðsfundum, ið inniber almannakunngerð av býráðslimum, er viðgerð av persónupplýsingum um limirnar og er tí fevnt av dátuverndarlógini. Persónupplýsingar um býráðslimir verða viðgjørdar í hesum føri, og tí skal grundarlag vera fyri hesi viðgerð. Hetta grundarlagið er samtykki frá býráðslimunum. Um býráðslimirnir ikki samtykkja stroymingina, kann stroymingin ikki fara fram, hóast fundirnir eru almennir.*
>
> ***Serligt undantak***
> *Hóast útgangsstøðið er, at allir býráðslimir skulu samtykkja, um ein býráðsfundur skal stroymast, hevur Dátueftirlitið gjørt av, at serliga koronustøðan, sum tók seg upp á várið í 2020, kann grundað frávik frá hesum útgangsstøði.*
> *Í teimum førum, tá luttøka á almennum býráðsfundum er skerd ella útilokað fyri at fyribyrgja smittuspjaðing, kann býráðsfundurin stroymast hóast allir býráðslimir ikki samtykkja. Orsøkin er, at stroymingin tá røkir samfelagsáhugamál, sum ikki kunnu røkjast á annan hátt.*

Hin 1. oktober 2018, viðgjørdi býráðið hetta sama hvørt stroymast skuldi frá býráðsfundum, tá fall málið við atkvøðugreiðslu.

Tá kunnaði løgfrøðingurin hjá kommunufalegnum at:

> *Dátueftirlitið og Dáturáðið hava umrøtt líknandi spurning og kom til ta niðurstøðu, at býráðslimir er fevndir av verndini í persónsupplýsingarlógini, og tí skulu geva samtykki til stroyming. Dáturáðið hevur eisini mett um, hvørt ein býráðssamtykt kann seta til viks persónsupplýsingarlógina, soleiðis at ein minniluti, sum er ímóti stroyming, ikki hevur krav uppá vernd. Dáturáðið er tó av teirri greiði fatan, at kommunustýrið ikki kann seta til síðis persónsupplýsingarlógina við eini býráðssamtykt. Niðurstøðan er tí, at samtykki er neyðugt frá hvørjum einstøkum býráðslimi, um býráðið ynskir at stroyma kommunustýrisfund.*

Hin 23. apríl 2020, var málið aftur á skrá.

> *Tá sum avleiðing av Korona kreppuni, ið avmarkar møguleikarnar at halda almennir býráðsfundir á lógligan hátt við áhoyrarum. Kommunala eftirlitið hevur viðgjørt serstøðuna viðv. koronakreppuni og niðurstøðan er at: Dátueftirlitið hevur tulkað persóns upplýsingar lógina soleiðis, at vanligt krevst samtykki frá øllum kommunustýrislimunum fyri at stroyma kommunustýrisfundir. Í hesum serligu tíðum, har landsstýrið hevur sett í verk nøkur tiltøk fyri at forða smittuspjaðingini av koronasjúkuni, kann tað verða torført at hava almennar*

*kommunustýrisfundir. Kommunala eftirliti hevur sett seg í samband við dátueftirlitið hesum viðvíkjandi, og er niðurstøðan tann at so leingi tilmælini frá landsstýrinum standa við, er tað nokk, at meirilutin í kommunustýrinum samtykkir, at kommunustýrisfundir verða stroymdir. Tað er ikki neyðugt við samtykki frá hvørjum einstøkum kommunustýrislimir fyri at kunna stroyma beinleiðis í hesum tíðum.*

**Lógargrundarlag:**
Dátuverndarlógini

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin játtan avsett á FÆ2025 til keyp av útbúnað

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Borgarstjórin heitur á uppskotsstillaran Arnfinn Bech um at greiða frá tilmælinum um at stroyma frá býráðsfundum.

Alvi Mortensen metur ikki at verandi býráðssalur er egnaður til stroyming, og mælir frá at fremja íløgur í útgerð til stroyming í verandi býráðsali, men at bíða inntil ein heildarætlan verður gjørd fyri býráðssalin.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá Alva Mortensen.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen
Ímóti er: ongin
Blankt eru: Barbara Michalina Tausen, Eyð Eidesgaard, Arnfinn Bech

Atkvøtt verður um tilmælið hjá uppskotsstillaranum Arnfinn Bech
Fyri eru: Barbara Michalina Tausen, Eyð Eidesgaard, Arnfinn Bech
Ímóti er: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen
Blankt eru: ongin

Uppskotið er fallið um at stroyma frá býráðsfundi.

## 21/25
## 24/00374-2 Fundarskipan fyri Tvøroyrar býráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Býráðið | 31.03.2025 | 21/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Samb. kommunustýrislógina skal ein fundarskipa samtykkjast fyri kommunustýrið

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, (Kommunustýrislógin).

> ***§ 5.*** *Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.*
>
> *Stk. 3. Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um sína málsmannagongd í eini fundarskipan.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Uppskot til fundarskipan fyri kommunustýrið setuna 2025-2028 verður við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 28. december 2024:**
Málið verður útsett til næsta fund.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Einmælt samtykt at býráðslimir lata inn broytingaruppskot til fundarskipan seinast 10. feb. 2025, og at fundarskipanin verður viðgjørd á fyrst komandi býráðsfundi.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Fundarskipanin samtykt einmælt sum fyriliggjandi, við tilmælið um, at grein §13, petti 5, fær áseting um at atkvøtt verður fyri/ímóti/blankt.

**22/25**
**24/00375-1 Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu 2025-**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.01.2025 | 2/25 |
| 2 Býráðið | 31.03.2025 | 22/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Samb. kommunustýrislógina skal ein kommunustýrisskipan samtykkjast fyri kommunustýrið

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, (Kommunustýrislógin).

> ***§ 5.*** *Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Uppskot til kommunustýrisskipan fyri setuna 2025-2028 verður við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:
Einmælt samtykt at býráðslimir lata inn broytingaruppskot til kommunustýrisskipan seinast 10. feb. 2025, og at kommstýrisskipanin verður viðgjørd á fyrst komandi býráðsfundi.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Borgarstjórin mælir til, at søguligir bygningar, ið eru ogn hjá Tvøroyrar kommunu verða ábyrgdarøkið hjá Mentanarnevndini undir §27, grein 6. Einmælt samtykt.

Heitt verður á umsitingina um at strika §27, punkt 8. Einmælt samtykt.

§30, aðrar nevndir, skattakærunevndin skal strikast.

Anita Vibergsdóttir mælir til, at §25, petti 4, fær eina áseting um, at sosiala nevnd umsitur "Eldratiltøk", ið nú liggja undir trivnar- og umhvørvisnevndini. Einmælt samtykt.

Kommunustýrisskipanin samtykt einmælt sum fyriliggjandi, við omanfyri nevndu tilmælum.

**23/25**
**25/00144-1 IRF -aðalfundur 29. apríl 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 31.03.2025 | 23/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 31.03.2025**
IRF kallar inn til aðalfund felagsins týsdagin 29. apríl 2025, kl. 10.30 í Mørkini Miklu 3, á Sandi.
Fundarskráin er:

**Til allar limakommunur hjá IRF**

## ÁRSAÐALFUNDUR 2025

Vegna nevndina hjá IRF verður við hesum boðað til ársaðalfund týsdagin, 29. apríl 2025 kl. 10.30.
Fundarstaður: Sands kommuna – Mørkin Mikla 3, 210 Sandur.

**Dagsskrá sambært grein 7 í viðtøkum felagsins:**

1. Framløga av virki felagsins í farna roknskaparári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi fyri 2024 til góðkenningar
3. Val av nevnd, sí grein 14 í viðtøkum felagsins
4. Val av grannskoðara, ið skal vera ríkisviðurkendur
5. Framløga av broyttari fíggjarætlan fyri 2025 og fíggjarætlan fyri 2026 til góðkenningar
   - 5.1. Frágreiðing um íløguætlanina fyri 2025 og 2026
6. Mál, sum nevndin ella lutaeigararnir vilja hava til viðgerðar
   - uppskot er komið um viðtøkubroytingar, um at hækka talið av nevndarlimum úr 6 upp í 7
   - ymiskt

**Viðlagt er:**

- Fulltrúarváttan at fylla út, og sum sambært viðtøkum felagsins grein 12, 5. stk., skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin, í seinasta lagi 24. apríl 2025.
- Prentað ársfrásøgn fyri 2024
- Broytt fíggjarætlan fyri 2025
- Fíggjarætlan fyri 2026
- Uppskot um limagjald fyri 2026
- Uppskot um íløguætlan fyri 2025 - 2026
- Samanbering av rakstrinum fyri 2024, broyttari fíggjarætlan fyri 2025 og fíggjarætlan fyri 2026
- Uppskot um viðtøkubroytingar frá Eysturkommunu
- IRF viðtøkur

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.- Anita Vibergsdóttir umboðar Tvøroyrar kommunu við valrætti til aðalfundin.

**Til kunningar**

## 6/25
## 21/00015-4 NÁM -avtala um undirvísignartilfar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 4 Mentanarnevndin | 10.03.2025 | 32/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 22/25 |
| 6 Býráðið | 31.03.2025 | 6/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.04.2024**
NÁM -Leingja avtaluna um undirvísingartilfar skúlaárið 2024/2025. *Sáttmáli undirskrivaður des. 2020 er viðheftur.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Skúlaárið 2023/2024, kr. 1.150,-/næming -Játtan av FÆ2024, §4 Undirvísing, fólkaskúlin

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndina og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 22. april 2024:**
Einmælt samtykt at leingja avtaluna við NÁM um undirvísingartilfar skúlaárið 2024/2025.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Einmælt samtykt at útsett málið til næsta fund, til tilmælið er komið frá skúlaleiðsluni.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá skúlastjóranum, at leingja sáttmálan við NÁM um undirvísingartilfar skúlaárið 2024/2025, ið verður fíggja av §410 Fólkaskúlin.

**Kommunustjórin 28.02.2025:**
Umsitingin hevur mótikið skriv frá Nám, við fyrisp. um leingjan av sáttmálanum um undirvísingartilfar og aðrar talgildar loysnir og undirvísingarportalin Snar. Nám skriva at í samráð við umsitingina hjá Kommunufelagnum at heita á kommununa um at leingja verandi sáttmála við verandi treytum og líki í 3 ár skúlaár 2025/2026 til og við 2027/2028. -Skúlastjórin í Tvøroyrar skúla er hoyrdir og mælir til at leingja sáttmála.

**Mentanarnevndin 10. marts 2025:**
Einmælt samtykt at leingja sáttmálan við NÁM, samsv. tilmælið hjá skúlastjóranum.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá skúlastjóranum og Mentanarnevndini.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt, kunnað og tikið til eftirtektar.

**7/25**
**25/00029-1 Skattainntøkur 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 2/25 |
| 4 Býráðið | 27.02.2025 | 4/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 3/25 |
| 6 Býráðið | 31.03.2025 | 7/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**8/25**
**25/00115-2 RFF -Ráðið fyri Ferðslutrygd ársfundur 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 21/25 |
| 2 Býráðið | 31.03.2025 | 8/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 06.03.2025**
Við hesum verður boðað limunum í Ráðnum fyri Ferðslutrygd frá, at ársfundur verður fríggjadagin hin 4. apríl 2025 í Skálanum í Norðurlandahúsinum frá kl. 9.30 til kl 14.00.

Heitt verður á limirnar at boða frá, hvør møtir teirra vegna á ársfundinum í seinasta lagi týsdagin 24. mars kl. 12.00 umvegis teldupost til rff@rff.fo

**Lógargrundarlag:**
- Formaðurin kallar inn við 30 daga freist (§5)
- Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu verða formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin og verða send limunum 7 dagar fyri fundin. (§6)
- Til ársfundin sendir hvør limur eitt umboð, sum hevur heimild at taka støðu vegna limin. (§4)

Nevndarval er annað hvørt ár og í 2024. Onki nevndarval er hesaferð.

Ráðið fyri ferðslutrygd er ráð undir Fiskivinnu- og Samferðslumálaráðnum, ið hevur hesar føstu limir: Akstovan, Kommunufelagið, Føroya Koyrilærarafelag, Føroya Landfúta, Føroya Læknafelag, Føroya Lærarafelag, Kvinnufelagssamskipan Føroya, Landsverk, Kringvarp Føroya, Trygd, Betri Trygging, avvarðandi aðalráð fyri undirvísingarmál og samferðslumál.
Umframt nevndu limir kunnu eisini kommunur, aðrir almennir stovnar og áhugafeløg (ikki vinnurekandi), sum vilja vera við í ferðslutrygdararbeiðinum, gerast limir. Eisini einstaklingar, vinnurekandi feløg og fyritøkur, sum vilja vera við í ferðslutrygdararbeiðinum, kunnu verða limir. Hesir limir verða nevndir ”Ferðslutrygdarvinir”.

**Stjórn og starvsnevnd**
Stjóri í Ráðnum fyri ferðslutrygd er Lovisa Petersen Glerfoss. Stjórin tekur sær av dagliga virksemi ráðsins.
Ráðið fyri ferðslutrygd hevur starvsnevnd, sum hittist hvønn mánað, tó ikki í juli og august. Í nevndini sita: Jónhild Rasmussen (Betri trygging), nevndarforkvinna, Vivian Johansen (Trygd), Marjun Jógvansdóttir (Tórshavnar kommuna), Karl Leonsson (Føroya Politi)og Dan Sofus Hofgaard (Landsverk). Varalimir eru: Bergur Samuelsen (Føroya Lærarafelag) og Dánjal Samuelsen (Strandfaraskip landsins).

Umframt skrá sambært viðtøkunum fara vit, sum vant, at hava okkurt fakligt upplegg. Hesaferð fara vit millum annað at umrøða spildurnýggja greinskingarverkætlan um ung og rúskoyring.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at Tvøroyrar kommuna verður umboða av Bjarna Hammer.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt, kunnað og tikið til eftirtektar

**9/25**
**25/00126-2 Integratiónslógin -integratiónssamskipari**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 28/25 |
| 2 Býráðið | 31.03.2025 | 9/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.03.2025**
Løgtingið hevur samtykt lógaruppskotið um integratión. Talan er um nýggja lóggávu, sum skal skipa tilgongdina fyri integratión í Føroyum. Uppskotið gevur myndugleikum greiðar heimildir at seta í verk og fremja integratiónsfremjandi átøk og gevur góðar karmar at skipa økið best møguligt.

Yvirskipað er endamálið við integratiónslógini at betra um integratiónina hjá tilflytarum. Hetta skal gerast við at tryggja, at tilflytarar fáa møguleika at gagnnýta sínar førleikar og síni evni á ein hátt, sum gevur teimum møguleika at vera fíggjarliga sjálvbjargnir og at luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar og í samsvari við grundleggjandi virði og siðvenjur í føroyska samfelagnum.

Lógaruppskotið er galdandi fyri allir útlendingar, sum hava uppihaldsloyvi í Føroyum, tó so at skilt verður millum ymisk sløg av uppihaldsloyvi.

Serlig atlit skulu tó takast fyri at tryggja børnum og ungum, sum koma til landið, væl eydnaða integratión, uttan mun til hvat slag av uppihaldsloyvi, tey hava.

Uppskotið ber í sær at landsmyndugleikar og kommunalir myndugleikar mugu arbeiða saman fyri at lyfta integratiónsøkið.

Lógaruppskotið kemur í gildi 1. juli 2025, tó so at summar ásetingar koma í gildi 1. januar 2026 og 1. juli 2026.

**Lógargrundarlag:**
Integratiónslógin "Kommunalir integratiónssamskiparar" § 4. Hvør kommuna skal í seinasta lagi 1. juli 2026 hava integratiónssamskipara. Stk. 2. Kommunurnar kunnu samstarva við aðrar kommunur um integratión og integratiónssamskiparar. Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann í samráð við kommunurnar áseta nærri reglur um integratiónsøkið og kommunalar integratiónssamskiparar, herundir reglur um, hvat skal gerast, um kommunurnar ikki halda sínar skyldur sambært løgtingslógini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Mælt verður Tvøroyrar býráð til, at viðgerða og taka støðu til, hvørt Tvøroyrar kommuna ynskir at seta integratiónssamskipara samsv.§4, stk1. ella samstarva við aðra kommunu samsv. §4, stk.2. í intigratiónslógini. Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og tikið upp á til nýggja viðgerð á einum seinni fundi.

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað, og tikið upp á til nýggja viðgerð á einum seinni fundi.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

Fundurin lokin kl. 18:30

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech